## IWC kann fara í upploysn

Eydnast tað ikki at fáa eina semju millum hvalaveiðilondini og mótstøðulondini, tá Altjóða Hvalaveiðinevndin kemur saman til fundar seinni í mánaðinum, kann tað hava við sær, at nevndin fer í upploysn. Tað sigur danska umboðið í nevndini, Ole Samsing, við Berlingske Tidende. Sjálvur ætlar hann sær at virka fyri at fáa semju, so nevndin kann halda fram, tí uttan IWC kunnu londini sjálv avgera, hvussu nógvan hval tey vilja veiða, sigur hann.



# Nógv virksemi á skipasmiðjunum

**- Brunnbáturin Vesthav er longdur við 12 metrum, og nú fara vit at byggja motorin á einum stórum íslendskum pelagiskum skipi um til tungolju, sigur Mourits Mohr, rakstarleiðari**

ÍDNAÐUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á Tórshavnar Skipasmiðju hava tey úr at gera, og soleiðis er eisini á Skála Skipasmiðju.

Mourits Mohr, rakstrarleiðari á skipasmiðjunum í Havn, Skála og Vestmanna, sigur, at í samtakinum eru í løtuni út við 300 fólk til arbeiðis, tá smiðjan FJM í Runavík og Pam Offshore eru tikin við.

Ábyrgdarøkið hjá Mouritsi fevnir tó ikki um FJM og Pam Offshore, men bert um tær tríggjar skipasmiðjurnar.

### Leingja Vesthav

Eitt av teimum stóru arbeiðunum á bedingini í Havn seinastu tíðina hevur verið leingjanin av brunnbátinum Vesthav hjá P/F Vestsalmon í Kollafirði.



*Brunnbáturin Vesthav er longdur við 12 metrum og verður ætlandi liðugur á Tórshavnar Skipasmiðju í hesum mánaðinum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Trolbáturin Hansa Maria hevur fingið nýggja maskinu – av sama slagi og somu støðd, sum maskinan, ið upprunaliga var í skipinum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Sambært Skipalistanum var brunnbáturin 27,84 metrar langur og 8 metrar breiður fyri leingjanina.

- Nú hava vit sett 12 metrar upp í skipið aftrat, umframt at aðrar umbyggingar eru framdar.

Mourits Mohr sigur, at sektiónin, sum er sett í skipið, er gjørd liðug, sandblást og málað, áðrenn skipið varð tikið upp á bedingina.

Hann sigur, at tíðarætlanin hevur ikki hildið, men at brunnbáturin verður liðugur í hesum mánaðinum.

- Tað er eitt sindur øðrvísi at leingja ein brunnbát, sum er opin enn eitt vanligt skip, og eitt nú krevur hetta serligar styrkingar, sigur Mourits.

Vesthav er smíðaður í Noreg í 1997, og útgerðarmaður í dag er Frímund Hansen.

### Nýggjan motor

Herfyri stóð eisini trolbáturin Hansa Maria hjá Hans Andriasi Poulsen á Toftum á bedingini hjá Tórshavnar Skipasmiðju.

Mourits Mohr sigur, at trolbáturin, sum er liðugur og er farin aftur til fiskiskap, hevur fingið nýggjan motor – av sama slagi og somu støðd, sum motorurin, ið frammanundan var í bátinum.

- Motorurin var í ólagi og er skiftur, og hetta er partvís ein tryggingarskaði, veit rakstrarleiðarin at siga.

Sambært Skipalistanum hevur Hansa Maria ein Scania Diesel, sum er 499 hk.

Hansa Maria er designað og teknað á Tórshavnar Skipasmiðju, men sjálvur skrokkurin er smíðaður í Póllandi. Alt arbeiði er annars gjørt liðugt í Føroyum.

Hansa Maria, heimahoyrandi á Toftum og Skálafossur, heimahoyrandi í Vestmanna, eru systurskip, og bæði eru longd á Skála Skipasmiðju.

### Umlegging

Um dagarnar er eisini ein stórur íslendskur bátur komin at liggja við bryggju niðanfyri bedingina hjá Tórshavnar Skipasmiðju. Hetta er eitt av teimum stóru pelagisku skipunum í íslendska fiskiskipaflotanum.

Mourits Mohr sigur, at høvuðsuppgávan hjá skipasmiðjuni í hesum sambandi verður at umbyggja maskinuna til tungolju.

- Vit hava eisini fleiri onnur arbeiði í gongd, serliga í Havn og á Skála, har arbeitt bæði verður við seinna nýbygninginum hjá Thor og nýggjari beding, sigur rakstrarleiðarin.

# Nú kunnu fýra djúpvatnstrolarar partrola

**- Teir stóru lemmatrolararnir skuldu ætlandi veiða kongafisk og blálongu, og tað er hetta, sum nú liggur til grunds fyri roynarloyvunum, sum skipini hava fingið at partrola, sigur Hjalti í Jákupsstovu á Fiskirannsóknarstovuni**

ROYNDARVEIÐA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fýra djúpvatnstrolarar sleppa nú í eini roynd at partrola, men dentur verður lagdur á, at teir ikki leggja seg eftir at veiða upsa.

Eftir at politiski myndugleikin hevur mælt til, at tvey royndarloyvi verða givin, hava Vaktar-og Bjargingartænastan saman við Fiskirannsóknarstovuni hugt upp á, hvar hesi skip kunnu royndarveiða við partroli.

Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni, sigur, at partarnir eru samdir um, hvar veiðan kann fara fram, og her verður dentur lagdur á, at skipini ikki fara at partrola eftir upsa.

Royndirnar skulu í staðin fara fram á djúpum vatni eftir eitt nú kongafiski og blálongu.

- Loyvi er givið fýra djúpvatnstrolarum at partrola, og sum eg havi skilt, skuldi nú verið greitt hjá skipunum at farið til fiskiskap.

Hjalti vísir á, at upprunaliga skuldu stóru lemmatrolararnir veiða kongafisk og blálongu, og tað er hetta, sum nú liggur til grunds fyri royndarloyvunum, sum skipini hava fingið.

- Vit hava sæð, at lemmatrolarar í størri og størri mun hava lagt seg eftir upsa, men hetta hevur ongantíð verið ætlanin við hesum skipum.

Hann heldur ikki, at tað hevði verið rætt at latið djúpvatnstrolararnar lagt seg eftir upsanum, nú royndarloyvi eru givið til partrol, tí upsin verður nóg hart royndur sum er.

- Hetta hevði eisini gjørt tað trengri hjá partrolarunum á landgrunninum, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

Stjórin á Fiskirannsóknarstovuni heldur annars, at hugskotið at royna at spara olju við partroli er gott, um royndin annars fer fram, soleiðis sum sett er út í kortið, har djúpvatnstrolararnir í fyrsta lagi leggja seg eftir djúpvatnsfiskasløgum.